# Havnarmenn vilja byggja flótandi hotell í Keypmannhavn

**Umsókn er send Keypmannahavnar kommunu at byggja eitt flótandi hotell meinlíkt tí, sum er skotið upp í Havn men nógvar ferðir størri**

HOTELL
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*




Teir tríggir havnarmenninir Martin Restorff, Johan Restorff og Petur Jacobsen hava sent Keypmannahavnar kommunu umsókn um at byggja eitt risastórt flótandi hotell í miðbýnum í Keypmannahavn. Talan er um eina verkætlan við 150 til 200 verilsum, sum kemur at kosta einar 150-200 mill. kr. Hartil hoyrandi er eisini hópur av felags fasilitetum so sum matstovum, ráðstevnuhølum oa.

Martin Restorff sigur, at teir hava sera góðar vónir um, at henda verkætlanin fer at vinna frama, tí her er talan um nýhugsan, sum kann koma ferðavinnuni í danska høvuðsstaðnum til góða.

Teir hava frammanundan latið umsóknir til flótandi hotell bæði í Havn og í Ålborg. – Vit hava enn einki fingið at vita frá Tórshavnar býráð, annað enn at hetta má hóska inn í heildarætlanina hjá kommununi fyri økið í Vágsbotni. Og tann heildarætlanin er enn ikki klár skilst.

Í Ålborg tykist ganga betur, tí har hevur kommunan nú ávíst eitt øki til eitt flótandi hotell sigur Martin Restorff. Hvat viðvíkur ætlanini í Havn, so ber ikki til at bíða í allar ævir sigur hann, men teir hava kortini góðar vónir og vilja bíða til politikararnir hava viðgjørt málið. Martin Restorff heldur, at eitt flótandi hotell í Vágsbotni kann fáa stóran týdning fyri framtíðar ferðavinnuna í býnum.

KAUPTHING BANK



Vika 10

# So byrjaði lækkingin

MARKNAÐARRÁK

Hesa farnu vikuna eru alheims partabrævamarknaðirnir lækkaðir millum 5%-10%. Dúgliga verður gitt um orsøkina til lækkingina. Skattabroytingar í Kina, støðan í Iran og tað, at Alan Greenspan segði afturgongd í amerikanska búskapinum vera „ein møguleika“, hava øll fingið skyldina. Vit meta, at tað ikki er ein einstøk hending, sum hevur fingið marknaðirnar at lækka. Sum vit áður hava skrivað her, hevur tað millum annað týdning at marknaðirnir eru hækkaðir nógv síðan juni, og at íleggjarar hava fingið hug at staðfesta nakað av vinninginum. Haraftrat hava spekulantar leingi satsað upp á kurshækkingar fyri læntar pengar. Tá marknaðirnir lækka eitt sindur, verða hesir noyddir at selja síni partabrøv, og hetta fær tey at lækka uppaftur meir. Vit meta, at partabrøv kunnu lækka nakað aftrat hesa vikuna, men at tað ikki er vandi á ferð fyri langtíðar íleggjarar.

## Yen styrknar

Japanski yen er styrknaður 4,5% hesa farnu vikuna. Hetta er eitt tekin um, at íleggjarar gerast minni váðafúsir. Íleggjarar hava leingi lænt pening í yen fyri lítla rentu og sett hann í íløgur í øðrum londum. Harvið hava íleggjarar bæði átikið sær váðan fyri íløgurnar, umframt gjaldoyraváðan á fíggingini. Tá íleggjarar gerast minni váðafúsir, fara teir burtur úr tílíkum íløgum. Harvið rinda teir lánini aftur í yen, og hetta fær hann at styrkna.

## Lánsbrævarentur halda á at lække

Lánsbrævarentur hildu á at lække í farnu viku. Danska 10-ára rentan lækkaði 0,06% til 3,93%. 1-árs rentan lækkaði meir, 0,11%. Hetta er tekin um, at íleggjarar flyta pening úr partabrøvum í tey stuttu lánsbrøvini, sum hava minst av rentuváða.

## Hesa vikuna

Eyguni verða framvegis havd við partabrævamarknaðinum. Dúgliga verður gitt, hvussu leingi hendan lækkingin varir. Kunngerðin av støðuni á amerikanska arbeiðsmarknaðinum fer væntandi at vera týðandi fyri markaðirnar, men óvíst er, um ein góð frágreiðing er nóg mikið til at venda partabrævagongdini.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 565,12 | 0,0% |
| JPY | 4,68 | -1,2% |
| GBP | 1.092,61 | -1,2% |
| NOK | 92,59 | -0,1% |
| SEK | 80,02 | -0,9% |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,64 | 0,3% |
| Norrøn Partabrøv | 125,15 | -5,6% |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** |
| Atlantic Petroleum | 616,50 | 0,0% |
| KB Trygg Eurostoxx | 106,21 | -2,7% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*